**Røða sum Tordur J. Niclasen, borgarstjóri, helt í samband við at Korndalsgarður alment varð tikin í nýtslu.**

Góðu foreldur,børn og starvsfólk.
Góða samkoma.

Í forhøllini í skúlanum hongur eitt sokallað “patcwork” .Talandi er at síggja barnahendurnar á vegginum har. Og munnu ikki øll foreldur seta sær spurningin, sum Hanna setti á sinni: “Hvat verður av hesum barni?” ella, “hvat fara hesar hendur at verða nýttar til”. Tað kunnu verða hendur sum geva ella hendur sum taka. Hendur sum tæna ella hendur sum krevja. Hendur sum draga til sín ella hendur sum stoyta frá sær. Hendur sum lætta um byrðuna hjá næstanum ella hendur sum tyngja um hana. Hendur sum knýta seg í vreiði ella hendur sum verða foldaðar. Hendur sum lætta um hjá tí veika ella hendur ið leggja forðingar í vegin. Hendur sum byggja ella hendur sum bróta niður? Hendur sum kína ella hendur sum sláa.

Tíðirnar skifta og mangt broytist á mansins ævi. Tíðin er helst farin, tá *“hvør lítil drongur so glaður fer, at stinga fliðu í fjøru”* Hjá mongum verður í dag helst róð meir út áalnótini – og har nýtist eingin fliða sum agn!
Eisini frá heimligum støðum, har skaldið Óli Egilstrøð,sáli hugtakandi tekur til og lýsir tíðarinnar umskifti:

*“ Tú dró meg sum barn, tá eg berføttur gekk*
*á Hamrinum niðri at síggja eg fekk,*
*tá menn drógu bátar í Válgaravík,*
*sum reyðargull goymi eg minni so rík.”*

Í samband við rákið, har sagt verður, at skúlin skal vera fyri øll- og í hesum sambandi innan dagstovnaøki - kemur fram fyri meg myndin um “Dáan” soleiðis sum hesin, so meistarliga verður
lýstur í “Barnarímum” hjá Hans Andr. Djurhuusi” .Ein sangur, sum sigur so nógv, um tilveru teirra livandi, teirrra hvørs lutur var líkur “Dáanum” og teirra sum hildu seg hava betri rætt enn Dáin, bæði til lívið sjálvt og at fáa lut í lívsins ágóðum: Eftir at Dáin hevur kent ágang og skuldsettur fyri bæði líkt og ólíkt, av teim “standandi øks”, so verður sagt um Dáan:
Men dáin stendur í iva
Og hann hevur ymsan lit:
Eg havi væl loyvi at liva
her líka so væl sum tit!

Tá verða tey øks at tagna
Tí tað segði Dáin satt:

# Hvønn vøkstur Gud hevur fagnað

Og hvør eigur lívsins rætt!

Í mínum huga heimi – og helst fleiri við mær - er HEIMIÐ hjá tí einstaka og uppvøksturin har, tað mest týdningarmikla staðið til myndan av barnasinninum. Tað er har, hitt trygga støði verður lagt – so væl sagt í týðingini eftir Hans Dalsgaard:
*Har lærdi meg móðir at fjála og æra*
*tann blett,har eg ljósið av fyrstantíð sá,*
*har rættsinn og mildi var barndómsins læra*
*har lærdi eg alt, sum mítt lív byggir á.*

Tó kann ikki koma uttan um, at bæði skúli og barnagarður hava ein týðandi leiklut og ávirkan tá talan er um uppaling. Í endamálsorðingi fyri Korndalsgarð verður m.a. sagt:
*Stovnurin skal viðvirka til eina kristna og siðalagsliga uppaling og fyrireika børnini til at liva við í og vera við til at taka avgerðir undir felags ábyrgd í einum fólkaræðisligum samfelag.*

Og tí síggi eg fyri mær Korndalsgarð sum ein urtagarður. Her vaksa fagra blómur – eingin er líka. Summar meir viðbreknar enn aðrar. Ymiskar á at líta, ymiskir litir, ymiskar eginleikar ja, tær anga ymiskt hesar blómur, sum eina

stokkuta stund eru, um eg so kann siga, í “varðveitslu” hjá urtagarðsfólkum.
Skal tað besta spyrjast burtur úr til trivna og menning er tað sera umráðandi, at eygað verður fest á ta einstøku blómuna, at tað verður fjálgað og lívgað um júst hana. Hesar blómur hava eina óskrivaða framtíð og er eingin ivi um, at hvussu eydnast fer í lívsins leiki undir sólarhita og høgættarstormi, man hondin sum vætaði innan barnagarðs gátt koma at hava árin á.
Vísur maður hevur einaferð sagt: *”Lær hin unga leiðina hann skal ganga, so víkur hann ikki av henni, heldur ikki, tá hann verður gamal”*
Stór avbjóðing – og ábyrgd eisini hjá tykkum starvsfólkum og vilja vit bert ynskja tykkum hepna hond í týdningarmikla starvi tykkara.

# Urtagarður “Korndalsgarður” er

vakrar blómur vaksa her
Skaparans mynd hvør einstøk ber
signað tann hond, ið vætar her

Granni hjá tykkum omanfyri eru tey, ið búgva á Korndalsbýlinum:
Vit eiga ikki at gloyma hesar/hesi, ið bygdu land og sum skaldið lýsir á henda hátt:

“Teir bygdu úr ongum
í tíðum so trongum
har lagnur í feigdini leiddust í vrá,
í strevi at veiða, seg sjálvan at eiga
Var viljin hin fremsti í huganum lá.

At virka og gjalda og síðan at valda
Í sparsemi stýra sær sjálvum framá
Teir kendu hvørt ýti, náttúrunnar býti
Hvørt mið, ja hvørt streymrák í havinum lá.

“Við hesum lykli vil eg bygdaráðsins og kommunurnar vegna handa tær Dorit og starvsfólkunum Korndalsgarð til nýtslu – við ynski um góðan byr og Harrans signing”

Takk fyri.